# Runavíkar Kommuna

Boks 139 · Heiðavegur 26 · FO-100 Saltangará
tlf 417000 · runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

## Stuðulsfólk

Søkt verður eftir Stuðulspedagogi/hjálpara til 5 ára gamalt barn við serligum tørvi í Runavíkar kommunu, at byrja 01.01.08 ella skjótast gjørligt.

Arbeiðið hjá stuðlinum er í samstarvi við Sosialu deild og familjuna at stuðla barninum í at fáa ein innihaldsríkan og mennandi dag. Arbeiðsstaðið er í heiminum hjá barninum.

Arbeiðstíðin er seinnapart millum 15-20 tímar um vikuna.

Sosiala deild skipar fyri, at starvsfólkið fær neyðuga ráðgeving.

Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 417000.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum verður at senda Runavíkar kommunu í seinasta lagi 19.12.07. Kl. 12:00

**Runavíkar Kommuna**
Att. Sosiala deild
Heiðavegur 26
Postrúm 139
610 Saltangará

# Uppstillingarfundur og hugnakvøld

Verður í Eiriksgarði í Dali 7. desember 2007 kl. 20.00.

Við verður tingmanningin hjá Javnaðarflokkinum.

**Møtið fjølment!**

**Nýggir limir kunnu tekna seg.**

***Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag***

# Gravarhjálp

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*www.gravarhjalp.net*

Sosialurin 341800

# Skeið á Fróðskaparsetri Føroya

**várið 2008**

**Próvskeið í føroyskum**
Á skeiðinum lærir tú at nýta málið sum amboð á ein góðan og fjøltáttaðan hátt í arbeiði og gerandislívi og tú fært betri fatan av føroyska málinum.
Skeiðið byrjar á **Fróðskaparsetrinum, Jónas Broncks gøtu 25, 100 Tórshavn**
14. januar og endar 16. apríl 2008 (12 vikur).
Próvtøkan verður 21. og 23. apríl 2008.

Undirvísing er mánadagar og mikudagar, báðar dagar kl. 15.15 - 17.30.

Skeiðið er ætlað teimum, ið hava føroyskt sum móðurmál og hava gingið í miðnámsskúla ella samsvarandi.
**Lærari: Lena Reinert**

Nágreiniligari upplýsingar og tilmeldingarbløð eru at fáa á setursskrivstovuni.
**Tilmeldingarfreistin er sett til 4. januar 2008.**
Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, so hvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.

**Tilmeldingargjaldið er 1.000 kr.**

Fyri próvtøku í føroyskum gjalda næmingar 500 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
**www.setur.fo**

TEAM85



# M/S Antares til sølu við fiskiloyvum

Um hóskandi boð fæst, verður línu- og snellubáturin Antares seldur við fiskiloyvum.

Antares hevur egningarmaskinu umborð og kassalast.

Báturin er júst komin av skipasmiðju og er í góðum standi.

Høvuðsmaskinan er ein Grenaa Diesel frá 1978.

Áhugað kunnu venda sær til **Tor Shipping á telefon 35 85 31, 21 85 31 ella 21 85 30.**

TOR SHIPPING

Sp/f Tor Shipping • Niels Finsensgøta 23 • P.O. Box 1252
FO-110 Tórshavn • tel. 35 85 31 • fax 35 85 30
www.torship.com • e-mail: torship@post.olivant.fo

VESTMANNA KOMMUNA

# GJÁARLON SØKIR EFTIR NÁMSFRØÐINGI OG AVLOYSARA

Søkt verður eftir námsfrøðingi og avloysara til dagstovnin Gjáarlon í Vestmanna at byrja 1. januar 2008.

**Vit sóknast eftir**
- 1 námsfrøðingi 20 tímar um vikuna. Um ongin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í staðin.
- 1 avloysara fyri hjálparfólk í farloyvi.

Starvið er tíðaravmarkað frá 1. januar 2008 til 1. januar 2009.

Starvið er ásett til 30 tímar um vikuna fram til summarfrítíðina; síðan 20 tímar um vikuna fram til 1. januar 2009

Dagstovnurin er í 5 eindum við vøggustovu og barnagarði – skipaður til íalt 84 børn.

Stovnurin letur upp kl. 7:15 og letur aftur kl. 17:15. Gjáarlon er ein grønur stovnur, sum leggur dent á at fara væl um umhvørvið inni sum úti.

Umstøðurnar eru sera góðar bæði innan– og uttandura.

**Vit bjóða**
Í tí dagliga arbeiðinum leggja vit stóran dent á trivnaðin hjá starvsfólkum og børnum, og vit virka alsamt fyri at skapa álit og tryggleika fyri børn og foreldur. Gerðandisdagurin er somuleiðis merktur av, at vit eru ein grønur stovnur.

**Vit ynskja**
Vit leggja dent á, at tú hevur førleika at arbeiða sjálvstøðugt, ert ágrýtin og nýhugsandi. Tú tekur ábyrgd og virkar í góðum samstarvi við samstarvsfelagar og foreldur, og saman við okkum ert tú við til at menna tað námsfrøðiliga arbeiði. Vit vænta, at tú sært møguleikar og avbjóðingar fram um forðingar.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanarviðurskifti eru skipað sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Morið A. O. Gardy, leiðara, á telefon 230134 ella Solveig Olsen, varaleiðara, á telefon 230154.

**Umsókn og freist**
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 14. desember, kl 12:00.

Setanarsamrøður verða í viku 51.

Send eina umsókn við avriti av prógvum og viðmælum til:

Gjáarlon
Hornavegur 16
FO – 350 Vestmanna

Umsóknir skulu merkjast »Gjáarlon«.

**DAGSTOVNURIN GJÁARLON**